# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tá eg tók við, svaraði føroyska landsliðið til donsku 2. deild, men átta ár seinni hevði liðið, tá tað hevði ein góðan dag, kunnu spælt upp í móti fleiri liðum í superliguni.*

*Allan Simonsen*

# Hevur vitjað 1150 vøllir í 65 FIFA-londum

**Stephan Schlei hevur sermerkt seg á tveimum mótum. Hann hevur havt Guinness-heimsmetið í at tumla kring heimin, og so hevur hann kýtt seg fyri at síggja fótbólt á so nógvum leikvøllum, sum gjørligt**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Hann hevur tumlað kring allan heim. Higartil hevur Stephan Schlei sæð dystir í 65 FIFA-limalondum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nakrir originalar vitja Føroyar millum ár og dag. Ein týskari, sum býr í Rattingen - sum liggur skamt frá Dusseldorf - vitjar í Føroyum í hesum døgum. 52 ára gamli Stephen Schlei hevur tvær stevnur her í lívinum. Onnur er at tumla seg gjøgnum lond. Hann hevur higartil tumlað seg gjøgnum so nógv lond, at talan veruliga er um heimsmet, sum er vorðið innritað í heimsmetbókini hjá Guinness. Stephan Schlei hevur tumlað nær um 1.300.000 kilometrar. Hin stevnan er at vitja flest møgulig FIFA-limalond, og at síggja flest møguligar leikvallir. Stephan setir tó sum mark, at talan skal verða um ein dyst í antin bestu ella næstbestu fótbóltsdeildini í einum FIFA-landi.

## Var í Landskrona

Stephan – sum heldur við Fortuna Dusseldorf - sigur, at hann hevur sæð Føroyar spæla á sínum »Tjóðarvølli«. Hetta var í 1991, tá føroyska A-landsliðið tapti 0-5 ímóti Norðurírlandi í Landskrona. Stephan leggur dent á, at tá á døgum varð Landskrona veruliga tjóðarvøllur føroyinga. 12 ár seinni sá Stephan Føroyar tapa 1-2 ímóti Íslandi á Laugardalsvøllinum í Reykjavík. 4 dagar seinni fann hann eitt sjónvarp í einari kiosk í Reykjavík, og har sat hann og hugdi eftir EM-undankappingardystinum millum Føroyar og Týskland. Tá 86 minuttir vóru farnir varð støðan javnleikur 0-0, og sjálvt um Stephan er týskari, so sat hann og vónaði, at føroyingar fóru at halda javnleikin, men tað eydnaðist tíverri ikki.

Farna vikuskiftið sá Stephan sínar fyrstu fótbóltsdystir í Føroyum. Leygardagin varð hann á Svangaskarði, og har sá hann dystin millum B68 og KÍ, sum B68 vann 1-0. Brosandi og entusiastiskt fortelur Stephan um allan vindin, sum varð á Svangaskarði, og um hvussu spælarnir máttu halda bóltinum við deyðbóltsstøður, so skjótast kundi. Dagin eftir vóru veðurgudarnir blíðari, tá hann sá dystin millum B36 og B71 í Gundadali.

Stephan harmast kortini um, at honum ikki býðst høvið at síggja elsta fótbóltsfelagið í Føroyum, TB. Hann er hugtikin av, at eitt føroyskt fótbóltsfelag kann verða frá 1892. Stephan hevði virðismett tað almikið, um TB hevði kunnað spælt ein venjingardyst ímeðan hann er í landinum. Men talan má verða um ein venjingardyst við einum ordiligum dómara, annars telur tað ikki í hagtølunum. So kanska teir í TB og VB/Sumba forbarma seg, og fyrireika ein venjingardyst fyri at gleða ein risastóran týskan fótbóltsfjeppara? Boðini eru hervið farin út!

## Andorra og Malta eru sermerkt

Stephan hevur sæð øll tey bestu liðini í teimum bestu fótbóltsdeildunum í Finnlandi, Danmark, Noregi og Svøríki. Hann manglar bert at síggja tveir leikvøllir. Hann manglar at fara til dyst í Frederiksstad á eystulandinum í Noregi. Eisini manglar Stephan at síggja leikvøllin hjá IFK Mariehamn, sum spælir í bestu finsku fótbóltsdeildini. Stephan gleðir seg at fara ein túr til Álandsoyggjarnar fyri at síggja IFK Mariehamn spæla ein heimadyst. Næsta FIFA-landið, sum er á skránni hjá Stephani, er pinkulýðveldið Andorra. Tað stuttliga við teimum átta liðunum í bestu fótbóltsdeildini í Andorra er, at tey spæla øll sínar ligadystir á sama øki. Haraftrat koma kanska tveir dystir í 2. deild seinni um kvøldið. Soleiðis kann Stephan síggja seks dystir uppá ein dag.

Stephan hevur eisini verið á Malta. Tað stuttliga við Malta er, at øll liðini í bestu maltesisku deildini spæla á Ta'qali Leikvøllinum, sum liggur uttanfyri Valetta. B36 og føroyska landsliðið hava góð minnir frá tí leikvøllinum. Tað verður spælt fríggjakvøld, leygardag og sunnudag í maltesisku liguni. Tað eydnaðist Stephani at síggja 10 dystir í bestu og næstbestu maltesisku deildini innan 45 tímar, meðan hann varð í Malta.

## Sá endan hjá DDR

Millum mongu stóru minnini hjá Stephani er, at tað untist honum at síggja síðsta landsdystin hjá DDR, sum varð ímóti Belgia í 1990. Møguliga fáa vit føroyingar ikki tey úrslitini vit ynskja okkum. Men okkara altjóða limaskapur í FIFA gevur okkum nógvar sjáldsamar vinir kring Heimin. Millum teir mest sjáldsomu eru Stephan Schlei. Mikudagin kl. 15.15 kunnu fólk hoyra samrøðuna við Stephan Schlei á Rás2.